## DAGSINS MEINING

# Hallið – hví og hvat nú?

Hallið á fíggjarlógini fyri 2004 er nú 410 milliónir, og her skal leggjast afturat, at konsekvent undirbudgettering hvørt tað einasta ár nú í nógv ár hevur skapt eina siðvenju við stórum eykajáttanarlógum hvørt ár. Hetta merkir, at tann hálva milliardin í halli, ið hevur verið nevnd, til stóra indignatión í Tjóðveldisflokkinum, ikki er av leið. Tað er hondvask, tá undanfarni landstýrismaðurin nú roynir at fáa tað at síggja út, sum hann einki eigur í hesum halli. Tað kann verða, at sjálv fíggjarlógin ikki er til, men ikki er talan um fiktivar útreiðslupostar.

Gamaní skuldu vit hava nøkur avgjøld uppá grønar keks og annað, men tað vildi ikki bøtt storvegis um hallið. Fíggjarlógin hjá Karsten Hansen hevði framvegis víst eitt hall uppá yvir 300 milliónir áðrenn eykajáttanir, uttan fleiri tiltøk. Hetta er fyrst og fremst tí, at inntøkumetingarnar hava verið órealistiskar. Skattgjaldarin kann ikki finna seg í, at inntøkumetingin knappliga fellir við útvið 10% uppá fáar mánaðir, uttan at nakar tekur ábyrgd av hesum. Tíðirnar kunnu vera versnaðar síðani august í fjør, men ikki so nógv, at man ikki sá hvønn veg tað bar. Tað er umráðand, at landstýrismaðurin, ið hevði ábyrgd av inntøkumetingunum, ið vóru lagdar fyri tingið í august, tekur politisku ábyrgdina, og harnæst eiga mannagongdir fyri, hvussu inntøkumetingar verða gjørdar at verða endurskoðaðar, so slíkt ikki hendir aftur.

Hetta tekur okkum aftur til blokkniðurskurðin. Í 80'unum høvdu vit donsku Ráðgevandi Nevndina, ið hvørt ár kom við ráðum, ið so fyri tað mesta vóru ignorerað. Hetta, at man ikki lurtaði eftir Ráðgevandi Nevndini var, við røttum ella ikki, eitt av stóru kritikkpunktunum, tá kreppuorsøkir skuldu finnast. Nú hava vit ikki longur Ráðgevandi Nevndina at ignorera, men hvør gevur so ráð viðvíkjandi føroyska búskapinum? Á hvørjum grundarlag lækkaði man blokkstuðulin við einari góðari millión um dagin? Hvussu var komið fram til júst hesa upphædd? Nógvir spurningar, ið krevja svar.

Vit standa sum skattgjaldarar við einum landskassa, ið er fráfarin so illa, at vandi er fyri at noyðast at læna til rakstur. Einasta fíggjarlógin, ið Karsten Hansen gjørdi eftir blokkniðurskurðin, er tann fyri 2003, og vit vita ikki, hvussu hendan fer at hylnast. Blokkniðurskurðurin uppá 366 milliónir var alt ov stórur, og nú heysta vit fruktirnar. Hetta hava vit víst á og ávarað móti ótaldar ferðir á hesum stað.

Um landið vil royna at halda samfelagshjólini koyrandi fyri at verja móti ov stórum arbeiðsloysi, so er umráðandi, at landið prioriterar sínar pengar rætt. Tað er ikki pláss til at ekspandera, og neyðugt verður uttan iva at spara í rakstrarútreiðslunum. Tað er tó umráðandi, at man ikki sparir við sonevnda salami mátanum, har alt verður skorið við nøkrum prosentum. Landstýrið má duga at velja frá, so at tað mesta kann rekast optimalt, meðan annað verður niðurlagt fullkomuliga, so at man ikki stendur við einum almennum sektori, har einki riggar til fulnar vegna pengatrot. Fyri at halda samfelagshjólunum koyrandi, so kann gerast neyðugt, at man loyvir teimum kommunum, ið eru væl fyri fíggjarliga, at gera íløgur í teimum árunum, ið nú koma. Íløgukarmurin eigur at fáa eina hart tiltrongda endurskoðan við hesum fyri eyga.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skjóta tíðindabløð journalistar?

**Uni Arge**
*Journalistur*



Í seinastuni havi eg í Dimmalætting skrivað eina greinarrøð, sum hevur varpað ljós á tað, sum nýggja samgongan ætlar. Greinirnar hava verið samrøður við ymsar persónar, sum við støði í samgonguskjalinum hava givið teirra boð uppá, hvat framtíðin man fara at bjóða búskaparliga, vinnuliga, politiskt, mentanarliga og sosialt.

Tað hevur verið hugaligt at frætt frá lesarum, at teimum hevur dámt at lisið samrøðurnar. Eg má tó siga, at tað hevur samstundis verið ógvuliga hugstoytt at sæð, hvussu illa Sosialurin er farin við summum av keldunum, sum samrøður eru gjørdar við.

Tann fyrsti, sum úttalaði seg, var Hermann Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum. Við hann gjørdist oddagreinskrivarin á Sosialinum so óður, at hann rætt og slætt mælti til at reka mannin úr starvi. Tað var vorðið sum argument at brúka ímóti keldu, sum roynir at ríka demokratiska orðaskiftið við sínum sjónarmiðum.

Samrøðan um yvirskipaðu stjórnarligu málsetningarnar hjá samgonguni var við Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðing. Hann varð í oddagrein í Sosialinum lagdur undir at vera ótrúverdugur og partapolitiskur. Altso legði oddagreinskrivarin aftur eftir manninum heldur enn at finna haldgóð argument í sínum høvdi at diskutera afturímóti við.

Nú hósdagin hendi so tað, at baksíðuteknarin fekk boð frá blaðstjóranum á Sosialinum um at leggja eftir sjálvum journalistinum, sum hevur skrivað samrøðurnar í Dimmalætting. Meiningin var ivaleyst at undirgrava journalistin. Aftur var altso persónlig útspilling sjálvt endamálið hjá Sosialinum.

Metodurnar hjá Sosialinum hesar dagarnar hava mint mistonkiliga nógv um óhugnaligu metodurnar, sum Dagblaðið plagdi at brúka fyrr í tíðini. Fólk, sum bara dittaðu sær at siga sína meining alment, vórðu útspilt og spottað persónliga. Ongantíð var endamálið at birta upp undir eitt sakligt orðaskifti. Ongantíð talaðu verulig argument.

So langt av leið er Sosialurin tíverri vilstur. Hann kallar seg tíðindablað, men er farin at skjóta journalistar og eygleiðarar, sum royna at geva samfelagsorðaskiftinum eitt ávíst innihald. Eg hevði ikki væntað hetta av Jan blaðstjóra, sum kallar seg journalist og demokrat. Men hann tykist eins og illi Óli á baksíðuni at vera fongdur við ógvusligari partapolitiskari sektarismu.

Við vón um góðan betring báðir tveir.

# Góði Uni



Tøkk fyri tína viðmerking. Tað er ikki rætt, at vit hava mælt til at reka Oskarsson úr starvi. Okkum vitandi er hann stjóri á Hagstovuni, og okkum vitandi er eingin, ið hevur mælt til at koyra hann haðani, har hann ivaleyst ger eitt gott arbeiði.

Nakað annað er so, at hann hevur ein nevndarsess í Búskaparráðnum, har hann er formaður. Okkara sjónarmið í oddagreinini er, at man burdi umhugsað at latið størri útskifting verða í hesum postinum við nøkrum ára millumbili, soleiðis sum vit kenna tað við økonomiskum "yvirvísmonnum" aðrastaðni. Tað átti eftir okkara tykki verið so, at uttan mun til hvør situr í hesum sessi, so eigur hetta at verða ein áraavmarkaður postur uppá til dømis 5 ár. Í Danmark verða vísmenninir útnevndir 3 ár í senn og siðvenja er, at endurútnvevna teir 1 ella 2 ferðir altso í mesta lagi 9 ár.

Viðvíkjandi serfrøðingum generelt, so eigur man at kunna krevja, at tey fakta, ið borðreitt verður við, eru í lagi. Eru tey ikki tað, so má man kunna tala at, um blaðmaðurin ikki sjálvur rættar viðkomandi.

Í samrøðuni við Jógvan Mørkøre vóru tveir faktuellir feilir, ið kunnu geva fólki eina skeiva mynd. Tann fyrri var pástandurin um, at Fólkaflokkurin júst var komin úr einari samgongu, ið ætlaði at yvirtaka løgreglu og rættarskipan. Hetta er ikki rætt, tí samgongufelagarnir hjá Fólkaflokkinum vildu ikki ganga við til meir enn fyrireiking, og var hetta orðingin í samgonguskjalinum.

Hitt seinna punktið, ið ikki var minni álvarsligt, var at kunngera sum eina nýggjheit, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin nú vilja broyta heimastýrislógina. Javnaðarflokkurin hevur havt uppskot um sjálvstýrislóg síðani 1990, og Sambandsflokkurin hevur nú í fleiri ár havt eitt sonevnt nýskipanaruppskot. Hetta merkir , at báðir flokkar í mong ár hava ásannað, at Heimastýrislógin hevur sæð sínar bestu dagar. Ongastaðni í oddagreinini verður sagt, at Mørkøre er partapolitiskur, men hann fer skeivur a tveimum punktum, og er hetta ikki við til at økja um trúvirðið á einari analysu, um faktuella grundarlagið er ov veikt.

Vit viðgera mál og serfrøðingaviðmerkingar. Vit seta ikki partapolitiskt spjaldur á serfrøðingar ella viðgera teirra persón – einans tað hesir siga í samfelagskjakinum. Um hetta ikki hevði verið møguligt, so var ikki talan um eitt samfelagskjak, men heldur um ein monolog, ið ikki hevði verið mennandi fyri nakran. Vil til endans siga, at bæði Herman og Jógvan hava leingi verið eitt frískt lot í tí annars oftani keðiliga og fastgróvna orðaskiftinum. Teir hava so sanniliga givið góð og ríkandi íkøst til samfelagstjakið, men harfyri er ikki sagt, at vit altíð skulu vera samdir.

Vinarliga

**Jan Müller, blaðstjóri**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Mongolrist?

**Óli Wolles**
*næstformaður í Javna*

Trolmenn brúka í summum førum rist í trolinum fyri at skilja tað frá, sum teir ikki skulu brúka. Á læknaliga økinum tykist gongdin eisini vera at brúka "rist", fyri at skilja tað frá, ið vit ikki hava brúk fyri. Nú eru tað mongolarnir, ið skulu sáldast frá.

**Trupulleikin**
Seinastu tíðina hevur verið frammi í fjølmiðlunum, at við nýggjum kanningarháttum er tað munandi lættari at kanna, um eitt fostur hevur Downs syndrom - eisini kallað mongolisma. Í seinastu "læknin hevur orðið" send-ingini í SvF 12. februar var hetta umrøtt. Har var greitt frá, hvussu tað nú ber til at skanna fostrið og at síggja við 75% vissu, um fostrið hevur Downs syndrom. Verða ymsir kanningarhættir nýttir saman, kann Downs syndrom staðfestast við rættiliga stórari vissu.

Fyrr var hetta gjørt við fosturvatnskanning; tað var ikki vandaleyst og kundi ikki gerast fyrr enn seint í barnsburðartíðini - eftir 12. viku, sum annars er evstamark fyri fosturtøku. Við móðurkøkubiopsi kann kanningin gerast heldur fyrr, men við sama vanda. Nýggja tøknin er púra vandaleys - sigst - og kann gerast væl fyrr.

Vísir kanningin, at fostrið hevur Downs syndrom, kann tó onki gerast fyri at bøta um brekið. Vitanin kann tí bert brúkast til at velja millum at fáa barn við breki - tað hevði mamman fingið kortini, uttan valmøguleikan - ella fosturtøku!

Summi donsk sjúkrahús hava longu innført hesa kanning, og donsku heilsumyndugleikarnir arbeiða við at bjóða øllum kvinnum við barn kanningina. Spurningurin er so, hvussu verður hjá okkum. Hvør ger av, um tað skal vera vanligt tilboð í Føroyum eisini?

**Trupulleiki - hjá hvørjum?**
Tað ljóðar gott, at nú ber til at gera kanningina uttan vanda fyri fostrið, og so tíðliga, at tað er innanfyri vanliga fosturtøkumarkið. Hetta tykist vera loysnin! Men hvat er trupulleikin? Er tað ein trupulleiki, at nøkur børn verða fødd við Downs syndromi? Hvønn er tað ein trupulleiki fyri? Tann sum hevur Downs syndrom? Foreldrini? Samfelagið? Læknarnar?

**Praktiskar hugleiðingar**
Fólk við Downs syndrom eru neyvan so nívd av lívinum, at tey kenna tað sum ein trupulleika. Tey eru fyri tað mesta lívsglað og sosial menniskju, sum hava sínar góðu og verru dagar sum flestu onnur. Og fram um so mong onnur so gera tey vanliga ikki haltari hønu mein. Hví tað skal vera so umráðandi at skanna fyri júst hetta brekið, er ilt at skilja.

**Foreldrini**
Foreldur teirra hava stundum sítt knoss og sínar sorgir, men sanniliga eisini góðar og gleðiligar dagar. Men er tað ikki galdandi fyri øll foreldur: Stríðast ikki flestu foreldur fyri síni børn, syrgin við hvørt, lættari og glaðari við hvørt. Børnini við Downs syndromi eru neyvan tey, ið fáa foreldur at liggja í andvekri á náttartíð, ella sum gera, at brúk er fyri Náttarravnunum um vikuskiftið.

**Samfelagið**
Er tað samfelagsliga ábyrgdin: at veita hesum borgarum somu kor sum øðrum, ið er ov dýr? Er trupulleikin, at politikarar vilja spara? Er trupulleikin fíggjarligur, eigur tað at vera tikið upp á Føroya Løgtingi, og so mugu menn - og kvinnur - tora at kalla ein spaka fyri ein spaka, og ikki fjala seg aftanfyri undanførslur.

Eg fái meg kortini illa at trúgva, at tað er trupul-leikin, tí mál, ið skuldu bøta um korini hjá menningartarnaðum, vóru í seinasta valskeiði einmælt samtykt á Føroya Løgtingi.

**Valmøguleikin**
Sagt verður, at kanningin er eitt tilboð, ikki eitt krav, og so hava foreldrini møguleika at velja, um tey skulu hava brekaða barnið ella ikki. Men er valmøguleikin ein fyrimunur? Fyri hvønn? Tað er í hvussu er ikki uttan trupulleikar.

Velja foreldur at fáa eitt barn við Downs syndrom, kunnu tey, tá tað gongur illa í hond, brigsla sær sjálvum, at tey kundu havt valt øðrvísi. Tað ger ikki lívið lættari. Og tá tey hava brúk fyri sersømdum sum stuðli ella øðrum í barnagarði ella skúla, er so ikki freistandi at siga, at: tit valdu móti betri vitandi! Hatta er tykkara trupulleiki!

Huga tær so, at maður og kona eru ósamd um kanningina. Lat okkum siga, at maðurin hevur hug at fáa kannað fyri Downs syndrom, konan ikki. Førir tað til fosturtøku, fer tað neyvan at styrkja húslagið teirra millum, og konan kann verða nívd av hesum og siga, at "tað var tín skyld". Endar tað hinvegin við, at tey ikki gera kanningina og so fáa eitt barn við breki, kann maðurin siga, at "tað er tín skyld". Man tað fara at gera lívið lættari ella lagið betri innanveggja?

**Etiskar hugleiðingar**
Etikkur snýr seg í grundini um, at man ikki skal gera alt tað, man kann gera. Etikkur er spurningurin, hvat man vil gera tað av tí, sum man kann gera. Við nútíðar tøkni kann man gera alt møguligt. Harvið er ikki sagt, at man skal gera tað. Til dømis kann man drepa politiskar mótstøðumenn. Tekniskt ber tað væl til - og verður enntá gjørt sumstaðni. Men man skal ikki gera tað - og tað er tíbetur ikki vanligt um okkara leiðir. Vit eru samd um, at tað vilja vit ikki, hóast tað tekniskt ber til. Hetta er etikkur: VIL kemur í millum KANN og SKAL.

**Vilja vit skilja?**
Spurningurin er so, hvat vit vilja í sambandi við fosturkanningar. Spurningurin er ikki bara, um vit vilja bjóða foreldrum at fáa kannað fostrið fyri Downs syndrom. Spurningurin er, um vit vilja hava eitt samfelag, har vit skilja summi menniskju frá eftir ávísum treytum.

Um vit vilja tað, hvørjar skulu treytirnar so vera? Hvussu tíðliga ella seint kann ein loyva sær at skilja frá? Hvussu stórt skal frávikið vera frá tí "normala"? Hvussu nívandi skal tað vera fyri einstaklingin, fyri umhvørvið ella fyri samfelagið?

**Markið**
Gongur markið við eitt "meinaleyst" brek sum Downs syndrom? Hvussu við sukur-sjúku ella einum skeivum fóti? Hvat um foreldrini eru alkoholikarar? Ella rúsevnismisnýtarar? Ella roykjarar? Ella kriminel? Ella ....?

Men eru hetta ikki trupulleikar, sum vælferðarsamfelagið kann hjálpa uppá? Jú, júst so. Og tað er eisini galdandi fyri barnið við Downs syndromi.

Hvørjar skilvísar grundir eru fyri, at tað júst er Downs syndrom, ið skal skiljast frá? Fólk við Downs syndromi eru ikki serliga til vanda fyri onnur, eitt nú við at koyra bil í fyllskapi, nýta harðskap ella at blása eitrandi royk úr sær. Hví skal markið ganga við Downs syndrom? Ella gongur markið als ikki her? Hvar gongur tað so?

**Javni**
Javni, felagið hjá menningartarnaðum og teirra familjum, hevur eina greiða støðu til, hvar markið gongur millum kann og skal á hesum øki. Í grundsjónarmiðum Javna verður staðfest, at Hvørt einstakt fólk er serstakt og at Øll - uttan mun til brek - hava sama rætt til lívið.

**Hvør verður lukkuligari?**
Um tøknin einsamøll ræður, er gongdin, at man skal gera tað, man kann gera. Vísindaligu "framstigini" eru so stór, at vit kunnu støðugt meira, og nógv, sum man ikki kundi fyri 20, 10 ella bara 1 ári síðani, tað kann man nú. Men vilja vit tað?

Í seinasta nummari av Samvirke (feb. 2004) er áhugaverd grein um lítla landið Butan í Himalayafjøllunum. Kongurin í Butan verður endurgivin fyri at hava sagt á eini ráðstevnu í Seoul um framtíðar visjónir millum ásiatisku londini, at "Eg hugsi ikki so nógv um bruttotjóðarúrtøkuna í landinum, sum um bruttotjóðar-eydnuna." Tað fær meg at spyrja: hvør verður lukkuligari av mongolristini?

Okkara ábyrgd er at taka støðu til, hvat man vil gera av øllum tí, man kann gera.

Ikki at taka nakra støðu er at velja, at kann = skal.

Meira er at lesa um fosturkanningar í seinasta nr. av blaðnum Javni.

Er tað ein trupulleiki, at nøkur børn verða fødd við Downs syndromi? Hvønn er tað ein trupulleiki fyri? Tann sum hevur Downs syndrom? Foreldrini? Samfelagið? Læknarnar?

Fólk við Downs syndrom eru neyvan so nívd av lívinum, at tey kenna tað sum ein trupulleika.

Børnini við Downs syndromi eru neyvan tey, ið fáa foreldur at liggja í andvekri á náttartíð, ella sum gera, at brúk er fyri Náttarravnunum um vikuskiftið.

Í stevnumiðunum staðfestir Javni, at Øllum - uttan mun til brek - skal tryggjast sami rættur til lívið.

Etikkur snýr seg í grundini um, at man ikki skal gera alt tað, man kann gera. Etikkur er spurningurin, hvat man vil gera tað av tí, sum man kann gera.

Gongur markið við eitt "meinaleyst" brek sum Downs syndrom? Hvussu við sukursjúku ella einum skeivum fóti?

Okkara ábyrgd er at taka støðu til, hvat man vil gera av øllum tí, man kann gera.

"Eg hugsi ikki so nógv um bruttotjóðarúrtøkuna í landinum, sum um bruttotjóðar-eydnuna."

# Grýlur, bomm og tunnusláttur á Torginum

**Tey sum atkvøða um bestu starvsfólkagrýluna eru við í lutakastinum um ein flogferðaseðil frá Atlantic Airways**

**FØSTULÁVINT**
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 21. februar eru allar grýlur – bæði lítlar sum stórar – vælkomnar í SMS til ein stuttligan dag. Tá skipar SMS nevnliga fyri stórum føstulávintstiltakið á Torginum og í húsinum annars. Eisini fara handlar í SMS at hava góð tilboð leygardagin. Frá kl. 10.00 bjóðar SMS eisini børnunum góðgæti frá Poul Hansen og Pop Top frá MBM.

Kl. 11.00 fara tey bæði Hannibal og systkinabarnið at undirhalda á pallinum, og tá plaga altíð mong børn at vera og hyggja at. Beint eftir sýningina, kunnu børnini gera bomm saman við teimum báðum á Torginum. Hannbal hevur hevur greitt okkum frá, at tey fara at gera fýra sløg av bommum, nevnliga við jarðberjavanilju-, ananas- og hindberjasmakki. Børnini sleppa sjálvi at gera bommini, klippa tey og pakka tey í posar, sum tey síðan kunnu taka við sær heim.

Kl. 13.00 verður tunnusláttur fyri børn upp til 13 ár. Tey smærru børnini, upp til 6 ár, skulu sláa eini lítla tunnu, meðan tey eldru – frá 7 til 13 ár – sleppa at sláa eina størri tunnu. Kattakongarnir fáa vinningar.

Av tí at tað er føstulávint fara vit eisini at heiðra vakrastu grýlunum, og tað ræður um at nýta hugflogið, tí vakrastu grýlurnar fáa góðar vinningar frá SMS. Kl. 14.00 verða vakrastu grýlurnar kosnar. Ikki nóg mikið við tí, so skal vakrasta starvsfólkagrýlan eisini finnast, og til tað hevur SMS brúk fyri tykkara hjálp, tí tað eru tey vitjandi í SMS leygardagin, sum avgera, hvør starvsfólkagrýla er vakrast. Atkvøðuseðlar eru at fáa á Torginum leygardagin ella á heimasíðuni hjá SMS, www.sms.fo . Øll tey sum atkvøða um bestu starvsfólkagrýluna eru við í lutakastinum um ein flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

SMS heilsar øllum, og boðar frá at tey gleða seg at síggja tykkum í SMS leygardagin 21. februar. – Eisini tykkum, sum ikki eru kløðd sum grýlur.

<u>Skráin:</u>
*Kl. 10.00:* Børnini fáa Pop Top frá MBM og góðgæti frá Poul Hansen Heilsølu á Torginum.
*Kl. 11.00:* Undirhald við Hannibal og systkinabarninum
*Kl. 11.30*: Børnini kunnu gera bomm saman við Hannibal og systkinabarninum á Torginum
*Kl. 13.00*: Tunnuslátttur fyri børn upp til 13 ár. Børnini er býtt í tveir aldursbólkar: upp til 6 ár og børn millum 7-13 ár. Kattakongarnir fáa vinning
*Kl. 14.00:* Vakrastu grýlurnar verða kosnar og fáa vinningar frá SMS. Vakrasta starvsfólkagrýlan verður avdúka, og vinnarin av flogferðaseðlinum frá Atlantic Airways verður funnin.